

*– Antin sótu skotini ikki nóg væl, ella eisini var Johan fyri teimum, staðfesti Agnar Joensen eftir dystin*

# Brendu ov nógv

**Agnar Joensen, sum aftur var sera eyðsýndur hjá VÍF, var ikki nøgdur um, at teir gulu misnýttu ov nógvar møguleikar fyri steðgin**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

– Vit brenna ov nógv fyri steðgin. Kanska skjóta vit ikki nóg væl, men eg haldi so heilt avgjørt, at Johan átti sín stóra lut í sigrinum hjá Kyndli.

Somikið avgjørdur var Agnar Joensen hjá VÍF, tá vit eftir dystin sunnudagin fingu orðið á hann og spurdu, hvørja áskoðan hann hevði um dystin.

Serstakliga sipaði hann við hesum til fyrstu løtuna, tá Kyndil vann sær munin, sum skuldi vísa seg sum avgerandi fyri dystin.

*Men tað at tit brenna. Kann tað ikki eisini koma av, at verjan hjá Kyndli riggar so sera væl hesa løtuna?*

– Tað ger hon kanska eisini. Men tað vita vit av. Vit kenna teirra leikarar, og teir fara hart út í álopið. Eg haldi sum so eisini, at tað eydnaðist okkum at koma hampuliga væl til skot hóast alt, men sum sagt, so sótu tey antin ikki nóg væl, ella eisini var Johan fyri teimum, staðfesti Agnar.

Seks mál vóru á muni í steðginum, men hóast hetta, so góvust vestmenningar ongantíð. At síggja til, so trúðu teir alla tíðina uppá, at hetta skuldi bera til, og Agnar helt eisini sjálvur, at teir ongantíð góvu upp.

– Vit fóru inn til seinna hálvleik fyri at venda dystinum. Og sjálvur haldi eg, at eg trúði ordiliga uppá møguleikan, tá vit høvdu minkað munin í tvey mál. Men tað gekk so tíverri ikki.

Hóast teir við hesum mistu heitið sum einsamalt oddalið, so er tó einki at ivast í, at tað framvegis er nógv at spæla um hjá VÍF. Eisini hóast tað nú er meira enn hálvt annað ár síðani, at teir seinast vunnu á Kyndli.

– Enn er so einki avgjørt. Vit hava tveir dystir eftir móti Kyndli, og vit eru javnir í stigum. So kappingin er framvegis púrasta opin, staðfesti Agnar Joensen at enda.

## VÍF-Kyndil 28

# Einki varð g



**Kyndil hevði speedaran í botni fyrsta góða korterið, og tann munin megnaði VÍF ongantíð at vinna aftur. Men hóast hetta, so varð talan í longum løtum um eina spennandi og undirhaldandi útgávu av føroyska hondbóltsklassikaranum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein at kalla stúgvandi full høll. Til tíðir gott spæl. Vilji aftan fyri hvørja einastu kropstackling. Heitt blóð millum leikararnar. Stutt sagt – intensitetur.

Tað eru høvuðsorðini, sum renna til hugs, tá næsti dysturin millum VÍF og Kyndil hetta kappingarárið skal greinast.

Hóast munurin millum liðini tað fyri tað nógva var somikið stórur, at Kyndil alla tíðina líktist einum vinnara, so var nervin í dystinum alla tíðina til staðar. Við einum Kyndilsliði, sum av øllum alvi stríddist fyri at halda fast um leiðsluna, sum teir høvdu vunnið, og við einum VÍF-liði, sum av eins nógvum alvi royndi at fanga teir grønu aftur.

### Ferðin og Johan

At munurin gjørdist so hampuligur beinanvegin, vóru fyrst og fremst tvær orsøkir til.

Fyrsta av hesum var, at Kyndil fyrstu longu løtuna spældi við speedaranum í botni. Ferðin varð skrúvað upp á eitt støði, sum sjáldan er at síggja í føroyskum hondbólti, og tað legði eitt ovurstórt trýst á VÍF. Ikki minst tóktist tað at órógva, at Kyndil alla tíðina vóru so kvikir at geva bóltin upp, tá VÍF hevði skorað. Málið tóktist heilt einfalt vera, at trýstið á VÍF verjuna skuldi vera støðugt og hart, og hetta eydnaðist eisini.

Longu eftir fyrsta góða korterinum, vóru eini fimm mál á muni, og tó at VÍF eftir hetta fótaði sær, og tó at Kyndil ómøguligt kundi halda somu leikferðini allan dystin, so tóktist hetta longu nú hava avgjørt dystin.

Hartil, so kom eisini, at Johan Danielsen enn einaferð hevði ein góðan dag í Kyndils-málinum. Sjálvandi fekk hann góða hjálp frá verjuni, sum í stóran mun kundi trýsta skjúttarnar hjá VÍF, men í fleiri førum var talan eisini um heilt góðar bjargingar, og einar tvær ferðir tók hann eisini royndir frá púrasta leysum vestmenningum.

Her megnaði Dejan Lacok ikki í eins stóran mun at hava leiklutin sum avgerandi maður.

### Noktaðu at gevast

Í løtunum eftir hetta tóktist tað, sum skuldi intensiteturin og spenningurin fara heilt úr dystinum. Kenslan hjá áskoðarunum mundi vera, at var munurin á liðunum veruliga somikið stórur, so var ikki stórvegis, ið VÍF kundi gera.

Men tað kundu teir kortini. Frá fyrsta bríksli í seinna hálvleiki tóktust teir hava sett sær fyri, at her skuldi vend koma í. Samstundis tóktust teir grønu als ikki vera til reiðar til hetta mótsvarið frá VÍF.

Og so gjørdist talan kortini um satt drama, sum minti um støðuna, har illa sperdi veiðurmaðurin at enda verður kroystur upp í eitt horn av stóru bjørnini. Har veidda djórið brádliga verður til tann, ið veiðir. Og so spældi VÍF eisini stóran part av hesi tíðini uttan Inga Olsen. Hann hevði fingið tvær útvísingar fyri steðgin, og tí valdi venjarin at hava hann á beinkinum í longum løtum eftir steðgin. Ein heldur merkisverd støðutakan, tí við hesum mistu vestmenningar sín kanska týdningarmesta leikara. Spurningurin er, um tað so ikki var betri at nýta Inga so langt, sum tað nú einaferð rakk. Ein triðja útvísing hevði so ikki havt størri avleiðingar, enn tað at hava mannin á beinkinum.

Langar løtur av seinna hálvleiki stóð Kyndil við rygginum móti múrinum. Ljóðbylgjurnar í høllini fóru upp í topp, hvørja ferð VÍF fekk minkað munin niður í eini tvey-trý mál, men mest sum í berum treiskni fingu teir grønu kortini økt aftur um munin.

Endaliga avgerðin tóktist fella, tá góður helmingur av seinna hálvleiki var farin. VÍF hevði aftur minkað munin í tvey, men tá Sámal Joensen fyrst fekk tveir minuttir, og Ingi Olsen lítla løtu seinni misnýtti brotskast, tóktist luftin fara úr teimum gulu. Kyndil fekk økt upp í seks mál, men hóast støðan nú tóktist vónleys, so noktaðu teir gulu at geva seg. Ferðin varð bara sett enn meira upp, og hó-